# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| | |
|---|---|
| Dagur: 23.okt. 2017<br>Tíð:kl 16.00 – 17.10 | Luttakarar: Allan, Bergun, Vivian, Bjørghild, Jóhan og Marjun<br><br>Ikki møtt:Bjørg |

| **Dagsskrá** | | **Frásøgn**<br>*Samandráttur av kunningini/umrøðuni, niðurstøða/avgerð, ásetan av ábyrgdarhava og møgulig freist.* | **Miðlan** |
|---|---|---|---|
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn (gerðabók) frá seinasta fundi (A) | Seinasta fundarfrásøgnin undirskrivað. | AM |
| 2. | Reglur fyri ferðing | Foreldur hava vent sær til skúla og skúlastýrið við spurninginum um, at næmingar kunnu fáa frí til at fara eina námsferð nú tey ganga í 9a.<br><br>Fyri mongum árum síðan er tikin ein avgerð um, at flokkar ikki skuldu fara uttanlandaferðir í skúlatíð. Henda regla kom í síni tíð vegna tað peningaliga trýstið sum foreldur kendu á sær vegna innsavning sum fór fram frá 1.flokki.<br>Ístaðn skuldu næmingar ferðast í egnum landi. Arbeiðstíðin hjá lærarum setir eisini sínar avmarkingar á tíðina sum er sett av til seturskúlar. Í dag er reglan tann at 3.fl, 6.fl og 9.fl fara á seturskúla og skúlin rindar fyri útreiðslurnar til ferðing og bústað.<br>Breið semja er um at vit skulu halda fast við at flokkar ikki skulu fara námsferðir uttanlanda, tí tað eru ikki øll, ið hava ráð til hesar ferðir.<br>Námsferðirnar eru afur á miðnámi og Nám-X,<br>Tað hava verið gjørd frávik, tá ið næmingar hava verið við til onkra kapping t.d. FLL ella roknikappingar. | AM/MH |
| 3. | Árliga skúlastýrisvitjanin | Skipað verður fyri tí árliga fundinum millum skúlastýrið og lærarar 20.feb kl 13.30 fundur saman við læraranum. Tosað bleiv um, at kanska skuldi skúlastýrið hava okkurt mál við sær til henda fundin. | MH |
| 4. | Kunning | a) Semja er gjørd um at útiljósini skulu verða gjørd í skúlanum. Arbeiðið fer skjótt í gongd og tekur áleið 4 vikur.<br>b) Vællærugreinar. Tosað bleiv um hvørjar vallærugreinarnar vóru og at t.d. motorlæra bleiv skipað sum minni skeið.<br>c) Svarluttøkan til trivnaðarkanningina var ikki heilt nøktandi við teimum 42%, so spurningurin er hvat viðri er í einari slíkari kanning. | MH |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | Spurnarkanningin verður ikki á hvørjum ári og mugu vit eftirmeta, hvussu vit frameftir skulu arbeiði við slíkum spurnarkanningum.<br><br>d) Lærarar fara á skeið í vikuskiftinum hjá lærara og sálarfrøðingi Anne Linder. Skeiðið er fríggjadag seinnapart og leygardag í "Professionelt relationsarbejde"<br>e) MMR skipar fyri eini ráðstevnu 7.nov og í tí sambandi verður skúlin stongdur. Frítíðarskúlin hevur opið fyri 0, 1., og 2. Fl.<br>f) Jólaborðhaldið er tann 26.feb.<br>g) Allan skal hava teldupostadressurnar hjá øllum foreldraumboðum | |